# Aglow í Havn: Í Miðlahúsinum leygarkvøldið

MØTI

Felagsskapurin Women´s Aglow er ein tvørkirkjuligur, heimsumfatandi felagsskapur.

Aglowmøti eru vanliga eina ferð um mánaðin, har allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Fyri at gera tað hugnaligt byrja vit við einum drekkamunni og onkrum góðum afturvið, hetta gevur ein góðan møguleika hjá kvinnunum at práta saman. Hesuferð kemur Birgit Thomsen at leiða sangin og Elin Tausen talar.

Tað, sum er áhugavert við Aglow, er, at kvinnur úr kirkjum, samkomum, og kvinnur, ið ikki hava nakað andaligt heim, kunnu vera saman um Guds Orð, hugna sær, stuðla og hjálpa hvørji aðrari. Aftan á drekkamunnin lovsyngja vit Harranum saman við lovsongsbólkinum. Hetta er ein sera gevandi løta.

Síðani verða antin 2 vitnisburðar, har kvinnur greiða frá, hvat Harrin hevur gjørt í teirra lívi, ella verður undirvísing í Guds Orði.

At enda verður møguleiki at koma til forbøn, har ávísir forbiðjarar vegleiða og biðja fyri hesum kvinnum.



*Nevndin í Aglow í Havn: Aftara rað frá vinstru: Ester Mohr, Lív Jacobsen formaður, Elly Djurhuus skrivari.*
*Fremra rað frá vinstru: Litzy Lamhauge, Essemia Vang*

Í Føroyum eru í alt 6 Aglow-bólkar. Bólkar eru í: Norðoyggjum, Esturoy, Vágum, Havn, Sandoy og Suðuroy. Yvir hesum bólkum er ein landsleiðsla við Elisabeth Joensen í Sørvági sum formanni.

Endamál okkara er:

**at** lovsyngja Gudi, at tilbiðja og dýrdargera Hann á øllum økjum í lívi okkara
**at** vinna sálir fyri Kristus, serliga tey, sum ilt er at náa við vanligari evangelisering
**at** luta evangelium Jesu Krists við trúgvandi um allan heim. Hetta umfatar bæði Jesus sum Frelsara, sum Hann, ið doypir í Heilaga Andanum, Hann, sum loysir og grøðir
**at** virka fyri andaligum einleika millum trúgvandi
**at** fostra felagsskap millum kvinnur
**at** eggja hvørja einstaka kvinnu til at gerast virkin í hennara lokalu samkomu/kirkju
**at** hjálpa kvinnum at finna teirra ávísa leiklut og pláss samsvarandi skriftini

# Modernaður tónleikur úr Noregi vitjar í Føroyum

**Norska Trioin Poing er á konsertferð í Føroyum, við sínum modernaða tónleiki, ið byggir á teirra áhuga í alskyns tónleikasløgum, í kvøld spælir trioin í Miðlahúsinum í morgin í Gøtukirkju.**

KONSERT

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í kvøld kl. 21 leggur miðlahúsið í Vágsbotni pall til Norsku trioina Poing, og fríggjakvøldið kl. 20 verður konsert við henni í Gøtu kirkju. Teir tríggir spæla fyri tað mesta modernaðan tónleik.

Poing er samansett av Rolf-Erik Nystrøm, saksofon, Frode Haltli, harmoniku og Håkon Thelin, kontrabass, og er sambært fyrireikarunum ein tann mest virkni tónleikabólkurini í Norður Evropa.

Alt slag av tónleiki hevur teirra áhuga, heilt frá klassiskum til rokk og fólkatónleik. Teir eru eyðkendir fyri arbeiða seg djúpt inn í ymisk sløg av tónleiki, ið teir geva sín egna stíl. Teir hava m.a. arbeitt saman við Dubliners og Arlo Guthri úr Runrig, umframt at teir hava spælt saman við symfoni orkestrum ymsta staðni í heiminum. Eisini hava teir arbeitt við etniskum tónleiki saman við tónleikarum úr Afrika, Persia og Samalandi. Í arbeiðinum við at skapa modernaðan tónleik, brýtur Poing fegin mærk fyri sampæl og fyri tolking av samtíðartónleiki. Trioin arbeiðir tætt saman við tónaskøldum í skapanarstøðuni, og teir eru ikki bangnir fyri truplum partiturum. Trioin hevur sum mál at røkka eina størri áskoðarafjøld enn tað etableraða umhvørvið innan klassiskan tónleik. Poing arbeiðir nógv við improvisatiónum og ofta blandar trioin akkustisk ljóðføri við elektronisk ljóðføri og forritan.



# THE PROVINCIALISTS í Listaskálanum

Leygardagin 28. oktober 2006 kl. 16.00 letur stór og annarleiðis framsýning upp í Listaskálanum. Tá er tað listafólkabólkurin THE PROVINCIALISTS, ið fyllir húsið við málningum, installatiónum, video og skulpturum

Í bólkinum eru Ane Lan, Noreg, Astri Luihn, Føroyar, Madeleine Park, Svøríki og Þórdís Alda Sigurðardóttir, Ísland.

Á framsýningini er videolist, har Ane Lan ger gjøldur burtur úr tí eyðkenda og tilgjørda norska tjóðskaparliga atburðinum og okkara fordómum. Ógvuliga stuttligt og tankavekjandi (og kanska ikki heilt ólíkur tí føroyska við hvørt).

Astri Luihn sker langar frisur í linoleum í sínum eyðkenda og originala framsetingarhátti. Hon tekur støðu í okkara mytum og náttúru á einum spennandi myndamóti: her og har, fjar og nær.

Madeleine Park er eitt listafólk, har listasøvnini uttanlands seta ávaringarplakatir uttanfyri, tá hon sýnir fram. Ert tú sart og tolir ikki elskandi listarligar framsetingar og eitt listafólk, ið nemur við okkara seksualitet í myndum og orðum, skalt tú ikki koma. Ein ferð inn í hennara glashús er tó væl verd at fara, um tú torir.

Þórdís Alda Sigurðardóttir hevur eina velduga skulpturella installatión, har hon viðger tað at hoyra til onkustaðni, tað at koma úr einum staði á fold.

Vit fáa eisini køkur, ið Madeleine Park hevur gjørt serstakar myndir á.

Við framsýningini THE PROVINCIALISTS, vilja vit eisini varpa ljós á hugmyndir um útjaðaran og geva íblástur til kjak um uppfatanir av útjaðaranum og tað at búgva og virka har. Á øllum økjum. Framsýningin umfatar eina nøgd av listarligum framsetingarhættum frá málningum og standmyndum til installatión og video. Samanumtikið er at siga um verkini, at tey eru úrslit av sínum staðbundna uppruna og endurspegla okkurt av honum onkursvegna. Henda list og hesi listafólk kunna væl fáa heitir sum eksotisk og original, og tað reisir aftur spurningin um, hvønn týdning hetta hevur fyri listina, og hvussu listafólkini møta útsagnum um at vera eksotisk.

Hvat merkir hugtakið provinsielt? Hvør ásetur at onkur ella okkurt er provinsielt, og hvat merkir tað, at onkur ella okkurt ikki er tað? Hvussu verða slík hugtøk brúkt, og hvørja ávirkan hevur hetta á samtíðar norðurlendska listaheimin?

Provinsialisma verður ofta nýtt til at gera gjøldur burtur úr teimum ella tí, tað verður sagt um. Mótsetningurin til provinsielt er urbant, og fólk, ið ikki meta seg sjálv sum urban, brúka ongantíð hugtakið provinsielt. Av sonnum sigur hugtakið meira um tey, ið brúka tað, enn um tey, tað er meint at siga nakað um. Hetta spei kemur skilligari fram, tá vit varnast, at tey ið brúka hugtakið, einamest gera tað fyri at vísa, hvussu urban tey eru sjálv og so nógv verðugari enn bygdafrellini.

Mentafólk í norðurlendsku høvuðsstøðunum hava lyndi til at meta alt uttan fyri høvuðsstaðirnar í heimlandinum sum útjaðari og seg sjálv sum partar av altjóða mentanarumhvørvinum í heimsins miðdeplum sum Berlin, New York, London og Milano. Hetta er umráðandi hjá sjálvuppgjørdum tykjarum í býunum, men tað fær vissuliga ein láturligan dám, tá hesi somu rokna sínar egnu smábýir sum Stockholm, Oslo og Keypmannahavn millum heimsins metropolar.

Vit hava valt heitið THE PROVINCIALISTS fyri at undirstrika, at vit medvitið hava valt at liva og virka í okkara egnu londum Noreg, Íslandi og Føroyum. Vit kenna ongar áneyðir at styðja okkum til uppgjørdar útsagnir um at vera betri og fínari, og halda til her í útjaðarunum, tí her kunna vit dyrka okkara egna listarliga mál.

THE PROVINCIALISTS hevur frumsýning í Føroyum, men síðani fer framsýningin víðari út í heim. Fyrst til Ísland og Noreg, síðani til New York, Chicago, Slovenia og Rom m.a.

Inger Lena Gaasemyr, ið er norskur listfrøðingur, búsitandi í Chicago, samskipar tiltakið og letur framsýningina upp.

## 2. Seminar

Sama dag, sum framsýningin letur upp, klokkan 10-15, verður seminar í Ovastovu í Nóatúni á Fróðskaparsetrinum.

THE PROVINCIALISTS setir fram spurningin, hvat provinsialisma er, og vil geva íblástur til kjak um hugtakið. Vit bjóða tí til seminar á Fróðskaparsetri Føroya, har innbodnir røðarar og luttakarar frá NIFCA varpa ljós á evnið úr søguligum og samtíðarligum sjónarhorni. Har verða framløgur og kjak um at skapa list og vera listafólk í altjóða høpi. Hvat hevur tað at siga fyri verkini, at listafólkini búgva og virka í útjaðarum? Er skapandi megin annarleiðis í útjaðara enn í miðdepli. Hvør veitir eitt slíkt heiti? Ber tað til at venda teimum við? Og hví verða tey brúkt við hvørt? Røðarar verða Bente Scavenius, DK, Baldur Hafstað, ÍS, Inger Lena Gaasemyr, N, Malan Marnersdóttir og Eyðun Andreassen, FØ.

Orðstýrarar eru:
Leygardagin 28, oktober: Carl J. Jensen
Sunnudagin 29. oktober: Oddfríður M. Rasmussen

**Seminarið verður** leygardagin 28. oktober kl. 10 – 15 og sunnudagin 29. oktober kl. 10 – 16.

Framsýningin er opin frá 28.10 til 18.12, týsdag til sunnudag kl. 14 – 16. Mánadag er stongt, siga Listasavn Føroya og Fróðskaparsetur Føroya í tíðindaskrivi.